Fylgiskjal 2

Fiskivinnuráðið

Fundur 2022/13

Stutt frásøgn frá fundi í Fiskivinnuráðnum týsdagin 04.oktobur 2022 kl. 14.00

Skrá:

0) Góðkenning av dagsskrá.
1) Uppskot til broyting í løgtingslóg um sjófeingi, (longjan av brúksskyldu).

Ad 0: Góðkend uttan viðmerking

Ad 1: Lógaruppskotið er sent til hoyring við stuttari freist, og tí er trupult at viðgera allar tættir í uppskotinum.

Fiskivinnuráðið hevur tó hesar viðmerkingar til heimildina hjá landsstýrismanninum at geva undantak frá brúksskylduni í § 36, stk. 3 : Greinin staðfestir, at landsstýrismaðurin hevur heimild at veita undantak fyri einstøk fiskifør í stk. 2. Tó greiða viðmerkingarnar til hesa áseting ikki serliga væl frá, nær undantak kann latast smb. § 36, stk. 3.

Mælt verður til, at viðmerkingarnar verða dagførdar við eini stuttari og neyvari frágreiðing um, nær undantak kann latast smb. hesi áseting. T.d. kundi verið skrivað, at undantak kann latast frá 3 ára brúksskylduni á fiskiloyvi, tá ið kvoturnar eru serliga smáar, tá ið veiðubann er lýst fyri ávísan fiskiskap ella tá ið eingin fiskiskapur er eftir kvotum, sum fiskiloyvi er útskrivað til, vegna fiskaloysi á hesi leið.

Víst verður á, at møguliga verða fleiri hoyringsskriv send frá teimum einstøku pørtunum.

Fundarfrásøgn varð lisin og góðkend.

Fundur lokin kl. 15.00.

Joanna Djurhuus Símun Grønadal